# Løgreglan í Havn um vikuskiftið

### Innbrot í Sirri

Leygarkvøldið, beint eftir miðnátt, var boðað frá innbrotið í Sirri. Ein maður hevði brotið inn í eini roynd at skaffa sær nakað av reiðum peningi. Hann royndi at rýma av staðnum, men varð tikin tætt við staðið beint eftir. Eygnavitni sóu mannin bróta inn og rýma, og kundu tískil siga júst hvar ið hann var. Vakthavandi sigur, at talan er um ein rættiliga góðan kenning hjá løgregluni, og nú verður hann so eisini ákærdur fyri innbrot.

–eys–



*Grindin, sum leygardagin legði beinini í Sandágerði, fór við meginpartinum av orkuni hjá løgregluni. Drápið gekk væl, sigur vakthavandi*

*Mynd: Jan Müller*

### Húsaófriður

Leygardagin 9. oktober varð løgreglan í Havn boðsend, í sambandi við húsaófrið. Konan ætlaði at rýma frá manninum, og hetta elvdi til stórt innanhýsis stríð, sum endaði við, at hon ringdi eftir løgregluni. Tá løgreglan kom á staðið, vildi konan tó ikki melda, hóast alt.

Vakthavandi upplýsir, at hetta ikki er heilt óvanligt. Tá løgreglan kemur á staðið, hevur viðkomandi, sum hevur meldað, ofta hug at angra. Men nú er lógin fyri húsaófrið nógv strammað, soleiðis, at um løgreglufólkið, sum kemur á staðið, sær, at annar parturin hevur verið fyri kroppsligum harðskapi, so skal tað skrivast upp. Allir sjónligir kroppsligir skaðar koma fyri dómaran, sum so avgerð hvat hendir víðari í málinum.

–eys–

### Gav løgregluni fingurin

Sunnumorgunin gekk ein fullur og ótillátaður ungur maður runt í Havnargøtum. Hann var sera provokerandi, og tá løgreglan talaði at, gjørdi hann ikki mætari enn at rætta longutong fram.

Vakthavandi staðfestir, at tað alt veldst um umstøðurnar, hvussu løgreglan ber seg at í slíkari støðu. Løtu seinni mátti ungi maðurin tó ásanna, at hann var farin um tolmarkið hjá løgreglumonnunum, og at tað tá ikki loysir seg at hava fingurin ov langt frammi. Hann varð nevniliga tikin og skuldsettur.

–eys–

### Húsaófriður

Sunnumorgunin 10. oktober um 6 tíðina varð løgreglan aftur boðsend í sambandi við húsaófrið. Hesuferð var tó talan um mann og elskarinnu hansara. Tey vóru farin at kjakst um eitthvørt, og tey endaðu í hornatøkum.

Tá løgreglan kom á staðið vóru tey sissað aftur, og eingin kroppsligur harðskapur var at síggja. Av tí, at einki var hent, verður ikki meiri gjørt í málinum.

–eys–

### Grindin

Grindin, sum leygardagin legði beinini í Sandágerði, fór við størsta partinum av orkuni hjá løgregluni. Vakthavandi sigur tó, at alt gekk fyrimyndarliga væl. Nakað av ferðslutrupulleikum vóru tó, tá grindin skuldi avheintast. Ferðsluproppar komu í, og tað gekk seint at fáa ferðsluna at glíða. Men tað vóru einastu trupulleikar, ið vóru, staðfestir vakthavandi.

–eys–

### Løgreglan í Runavík um vikuskiftið

Vakthavandi í Runavík sigur, at lítið og einki hevur verið at gjørt í Eysturoynni um vikuskiftið. Tveir smáskaðar á bilar vóru fráboðaðir, annars hendi einki nevnivert.

–eys–

### Løgreglan í Klaksvík um vikuskiftið

Vakthavandi í Klaksvík sigur, at Klaksvíkin tað sama kundi verið útdeyð, so friðarligt hevur tað verið um vikuskiftið. – Tað hevur verið púra, púra, stein deytt. Her hevur einki verið av nøkrum, sigur vakthavandi í stuttari viðmerking.

–eys–




